# BÓKASÍÐAN

*bøkur, bøkur, bøkur...*



Ritstjórn: Anna V. Ellingsgaard
anna@sosialurin.fo

## Deyðssjúkur kærleiki

Ray Kluun, *En slags kærlighed*, Cicero, 2007

Evnið í bókini *En slags kærlighed* fær illa verið meir tabufongt.

36 ára gamli hálendingurin Ray Kluun er ein maður, sum stuttleikaði sær við eini røð av elskarinnum, meðan kona hansara lá fyri deyðanum av bróstkrabba. Hetta kundi havt verið eitt mál millum Ray og hansara samvitsku, um hann ikki seinni skrivaði bókina *En slags kærlighed*, um ein 36 ára gamlan hálending, sum stuttleikar sær við eini røð av elskarinnum, meðan kona hansara liggur fyri deyðanum av bróstkrabba.

Tá tað gekk upp fyri lesarum, at søgan hjá Ray Kluun er sonn og snýr seg um hann sjálvan, mundi moralska fordømingin ongan enda fáa. Men uttan mun til beiska veruleikan, so er bókin ein ómetaliga hjartanemandi og erlig kærleikssøga. Ray er um at blíva svakur av, at teirra eydnuríka lív saman er vorðið ein troystaleysur knútur av spýggj, vamli, kemoviðgerðum, gráti og ræðslu. Kortini er hann hjá konuni allan vegin ígjøgnum. Og elskarinnurnar? Tær eru hansara máti at yvirliva og siga sær sjálvum, at kærleikin livir, hóast alt.

"Summi halda meg vera heimsins størsta reyvarhol, onnur kalla meg ein nýggjan kærleiks Messias. Tað mugu tey um. Eg hava bara sagt, sum var", sigur Ray Kluun.

**ave**



*Lesarar fingu eitt sjokk, tá teir varnaðust, at søgan hjá Ray Kluun var sonn*

# Krimidrotningar og skaldakongar í orrustu

**Tað leikar hart á í svenska bókaheiminum, har sokallaðar hysteriskar krimidrotningar og uppblástir skaldakongar eru lopin í krovið á hvørjumøðrum**

## Bókastríð



**Anna V. Ellingsgaard**
anna@sosialurin.fo

Tær duga ikki at skriva og skaða sannan skaldskap, ljóða atfinningarnar móti sokallaðu svensku krimidrotningunum frá teirra mannligu starvsfeløgum.

Øvundsjúkir, sjálvuútnevndir skaldakongar, ið ikki tola, at vit selja fleiri bøkur, enn teir, svara krimidrotningarnar aftur.

Soleiðis hava ákærurnar fokið gjøgnum luftina á svenska bókapallinum síðani tíðliga í summar. Serliga eru tað metseljandi krimidrotningarnar, Liza Marklund og Camilla Läckberg, ið hava staðið fyri skotum, men eisini vælumtóktir krimihøvundar sum Mari Jungstedt, Inger Frimansson og Anna Jansson hava fingið sítt. Felags fyri tær er, at tær eru kvinnur og verða ákærdar fyri at skriva so vánaliga, at tað er synd og skomm og ikki minst oyðileggjandi fyri rithøvundayrkið yvirhøvur.

### Eitt slag av porno

Hóast mest persónligu og larmandi álopini í orrustuni ivaleyst hava havt størst undirhaldsvirði, er tað nokk meir áhugavert at hyggja nærri at grundgevingunum hjá til dømis lektaranum Per Bjørnar Grande.

Grande ásannar, at tað neyvan finst nakað klassiskt verk, sum ikki inniheldur krimielement. Hann vísir á,



*Høvundarnir Camilla Läckberg og Liza Marklund hava staðið fyri høðrum skotum í svensku krimiorrustuni*

at morð, øvundsjúka og girnd altíð hava verið høvuðstilfarið í skaldsøgusjangruni. Í so máta eru bæði skaldsøgurnar hjá Dostojevski og harmleikirnir hjá Shakespeare á tremur við krimitilfari.

Trupulleikin er, at krimisjangran reindyrkar morðið og setir tað inn í eina tronga skipan, sum er altíð er eins og eins løtt at spáa um. Krimisøgur líkjast tí klassisku skaldsøguni á sama hátt, sum porno líkist kærleikssøgum. Høvundurin sleppur tí fjølbroytta og savnar seg bara um morðið ella kynsgøgnini. Sambært Grande gongur øll lesingin tí út uppá at flyta seg skjótt frá einum stað til eitt annað fyri at varðveita spenningin. Meir ambitiøsir rithøvundar tora hinvegin at dvølja við hugleiðingar, sum fáa eitt virði í sær sjálvum í mátanum, tær royna at kaga inn í menniskjasálina.

### Sum sjónvarpskokkar

Sambært Grande ber tað ikki til at skapa góðan skaldskap innan trongu og tugdu krimikarmarnar. Endurnýggjan av skaldskapi er oftast úrslit av, at sjangran kennist ov trong til at siga tað, ein vil siga. Men í staðin fyri at royna at spreingja trongu karmarnar, skerja krimihøvundar upplivingar og hendingar, so at tær hóska inn í karmarnar. Grande vísir á, at hesir høvundar hava alt tilfarið, teir hava brúk fyri, men gera síðani sum sjónvarpskokkar: Teir snýta, kuta tilgongdir burtur, og út úr krimiovninum kemur rúkandi spenningur men onki innlit.

### Onki nýtt

Hvussu er ella ikki, so er tað eftir øllum at døma slíkt, svenskir lesarar vilja hava. Krimibøkurnar troka støðugt aðrar bøkur av svensku metsølulistunum, og fleiri av sama slag leggjast til alla tíðina.

Sjálvar hava krimidrotningarnar hildið seg lutfallsliga tigandi í kjakinum. Camilla Läckberg hevur tó roynt at teppa atfinningarsomu røddirnar við at kalla tær nakað tvætl frá nøkrum gomlum monnum, sum kenna seg snýttan á onkran hátt. Mari Jungstedt hevur bert turrsliga viðmerkt, at tað sum so onki nýtt er í, at mannfólk ikki tola at verða yvirhálað av vælumtóktum, vøkrum kvinnum.

Ein av dyggu stuðlunum hjá krimidrotningunum hevur verið viðmerkjarin Linda Skugge, ið herfyri ikki legði fingrarnar ímillum, tá hon staðfesti at:

- Camilla Läckberg megnar kynstrið at skriva, so at ótrúliga nógv fólk vilja lesa tað. Loyndarmálið er "sambond". Fólk vilja sleppa at lesa um gerandisdagin og sambond millum menniskju. So góðtakið støðuna, allir tit uppblástu høvundar, ella byrjið at skriva eitt sindur betri, so fólk tíma at keypa tykkara bøkur.

## Horvni forsetin

Anne Holt, *Madam President*, Gyldendal, 2007

Norska krimidrotningin Anne Holt tekur við seinastu bók sínari eitt stórt fet út á tann altjóða thrillerpallin við søguni um amerikanska forsetan, sum hvørvur í norska høvuðsstaðnum. Um ein líltan mánað vitjar ein fyrrverandi amerikanskur forseti í Føroyum, men vónandi verður hansara vitjan ikki so dramatisk, sum tá ið Helen Lardahl Bentley vitjar í Noregi í hesari bókini.

Anne Holt dugir frágera væl at gera sínar søgur spennandi. Hon skapar pallsetingar og flytir seg trygt millum hesar. Tað hongur allatíðina nakað spennandi í luftini, tá ið pallsetingin skiftir.

Sjálv søgugongdin er fangandi og spennandi, og sum aðrir norðurlendskir krimihøvundar dugir Anne Holt væl at gera sínar persónar livandi. Tey, sum hava lisið aðrar bøkur hjá Anne Holt, kennast við løgreglukvinnuna Hanne Vilhelmsen, sum fyri nøkrum bókum síðani varð skotin. Nú hitta vit hana aftur í hesari bókini, har teir nýggju høvuðspersónarnir Inger Johanne Vik og Yngvar Stubø eisini eru við.

Vit fylgja hendingum ymsastaðni í heiminum, og so líðandi verður alt knýtt saman til eina samanhangandi – og realistiska – søgu við stórum spenningi og framúr góðum undirhaldi. Krimisøgurnar – thrillarnir - gerast ikki nógv betur enn tær hjá Anne Holt.

**ek**




*Forsetavitjanin í nýggju krimibókini hjá Anne Holt gerst ein sannur thrillari ...*